Høgni Hoydal:

# - Embætismenninir gjørdu røðuna politiska

- Eg havi ikki nýtt røðuna hjá drotningini til politikk. Tað eru embætismenninir í forsætismálaráðnum, sum hava gjørt røðuna politiska, sigur Høgni Hoydal í sambandi við viðmerkingarnar hjá Hans Engell.

Hans Engell, chef-redaktørur á Ekstra Blaðnum, segði um vikuskiftið, at Høgni Hoydal er órímiligur, og sjálvt ikki teir mest republikansku donsku politikararnir høvdu nýtt drotningarøðuna í politiskum stríði.

Men Høgni Hoydal sigur, at hann hevur ikki nýtt røðuna hjá drotningini til at føra politikk. Tjóðveldisformaðurin sigur, at tað eru embætismenninir í forsætismálaráðnum, sum hava gjørt røðuna politiska.

Høgni Hoydal sigur eisini, at hetta hevði ikki gingið, um okkurt líknandi hendi í Danmark.

- Lat okkum taka eitt dømi. Um svenski kongurin kom til Danmarkar og úttalaði seg um útlendingalógina, so kann man spyrja, hvat danskir politikarar høvdu sagt, sigur Høgni Hoydal.

- Hans Engell dugir ikki at síggja henda vinkulin. Um hetta hendi í Danmark, so hevði støðan verið ein heilt onnur. Tá høvdu Hans Engell og aðrir verið skjótir at funnist at. Men nú hendi tað í Føroyum, og tá er tað í lagi, sigur Høgni Hoydal.

**-hkm**



*- Um svenski kongurin kom til Danmarkar og úttalaði seg um útlendingalógina, so kann man spyrja, hvat danskir politikarar høvdu sagt, sigur Høgni Hoydal*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hans Engell:

## - Høgni Hoydal hevur misnýtt vitjanina hjá drotningini

- Sjálvt ikki teir mest republikansku donsku politikararnir høvdu nýtt drotningarøðuna í politiskum stríði, sum Høgni Hoydal hevur gjørt, sigur Hans Engell um viðmerkingarnar hjá Høgna Hoydal í sambandi við røðuna hjá Margrethu Drotning.

Høgni Hoydal segði aftaná røðuna hjá drotningini, sum varð hildin í sambandi við føroyavitjanina, at røðan var politisk.

Hans Engell, chef-redaktørur á danska Ekstrablaðnum, sigur, at atfinningarnar hjá Høgna Hoydal eru fullkomiliga órímiligar.

- Hatta er misnýtsla av røðuni hjá drotningini, tað sum Høgni Hoydal ger. Um hann vil kjakast um ríkisfelagsskapin, so eigur tað at vera við danskar politikarar og føroysku veljararnar, sigur Hans Engell.

Hans Engell sigur seg hava nærlisið røðuna hjá Margretu Drotning, og at onki er at koma eftir.

- Røðan er lýsing av umstøðunum, sum tær eru, harundir ein lýsing av eini lóg, sum viðvíkur heimildunum hjá Føroyum, sigur Hans Engell.

- Vit vita, at Tjóðveldisflokkurin vil hava meira víttgangandi heimildir.

Men tað er órimiligt at leggja eftir drotningini, tí hon hevur onki við tað at gera. Hon kann ikki fara inn í eitt kjak um ríkisfelagsskapin. Høgni Hoydal hevur misnýtt vitjanina hjá drotningini, sigur Hans Engell, chef-redaktørur á Ekstra Blaðnum.

**-hkm**



*- Hatta er misnýtsla av røðuni hjá drotningini, tað sum Høgni Hoydal ger. Um hann vil kjakast um ríkisfelagsskapin, so eigur tað at vera við danskar politikarar og føroysku veljararnar, sigur Hans Engell*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Yvir 1.000 fólk á MjúS

Fyrstu leysligu metingarnar vísa, at yvir túsund fólk høvdu leitað sær til Sands á MjúS.

Katrin Petersen, fyrireikari, sigur, at tað var serliga Saybia, sum lokkaði fólk til Sands at lurta eftir tónleiki. Veðrið hilnaðist rímiliga væl, og tað gekk væl at flyta fólk aftur og fram millum oyggjarnar.

## Norðlýsið varð fyrst

Longu áðrenn seinasta grótið í Norðoytunlinum varð sprongt vekk leygardagin var eitt eintak av Norðlýsinum farið ígjøgnum tunnilin.

Oliver Joensen, blaðstjóri á Norðlýsinum, hevði funnið eitt lítið hol, har hann sendi prentaðu útgávuna av Norðlýsinum ígjøgnum. Móttakari hinumegin var Tórður Mikkelsen og eitt sjónvarpslið hjá Sjónvarpi Føroya.

Fyrstu fólk at koma ígjøgnum tunnilin vóru tingmenn og onnur, sum leygardagin vóru við, tá sprongt varð í gjøgnum. Tað var Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í innlendismálum og fyrrverandi borgarstjóri í Klaksvík, sum fekk heiðurin at lata seinasta skotið av.

## Arbeiðið við Norðoyatunlinum er framskundað

Miðað verður ímóti, at tað skal verða koyrandi um Leirvíksfjørð í mái mánaði næsta ár. Hetta er tríggjar mánaðir fyrr enn uppruna-liga ætlað.

Dávid Reinert Hansen segði við Útvarpið fríggjakvøldið, at bert fýra metrar av veggi skulu ruddast afturat, og at tað longu nú ber til at hyggja ígjøgnum. Tað varð Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í innlendismálum og fyrrverandi borgarstjóri í Klaksvík, sum skuldi skjóta seinasta skotið. Hetta varð gjørt klokkan 17:00 leygardagin.



*Norðoyatunnilin verður liðugur tríggjar mánaðir áðrenn ásettu tíðina*

## Dýrari at flúgva í Vágunum

Frá 1. juli fer flogvallaravgjaldið upp. Tað er økta virksemið hjá Atlantsflog, sum er orsøk til hækkaða avgjaldið.

Útvarpið visti at siga fríggjakvøldið, at gjaldið fer upp við 9 prosentum. Hetta er fyri flutning, samstundis sum avgjaldið fyri hvønn ferðandi verður hækkað úr 130 krónum upp í 143 krónur.

Flogvallaovastin Finnbogi Niclasen sigur við Útvarpið, at avgjaldið má hækkast nú fyri at raksturin ikki skal versna.

Fleiri fólk skulu setast í Vága Floghavn, tí tænastukrøvini harnað alsamt.

- Tað er neyðugt við fleiri starvsfólkum, um arbeiðaraverndarlógin skal haldast, sigur Finnbogi Niclasen við Útvarpið.

## Hvør sær mest tápuligur út í føroyskum klæðum?

Heindrikur prinsur liggur frammaliga í feltinum, tá tað snýr seg um at síggja tápuligur út í føroyskum klæðum. Hetta er í øllum førum satt, um tú spyrt lesarar hjá danska Ekstra Blaðnum.

Inni á heimasíðuna hjá Ekstra Blaðnum www.eb.dk er ein spurnarkanning. Spurningurin er, hvør sær mest tápuligur út í føroyskum klæðum. Veljast kann ímillum Heindrik prins og krúnprinsessu Mary.

Her halda 87 prosent av lesarunum, at Heindrikur prinsur sær mest "fjollutur" út, sum tikið verður til í Ekstra Blaðnum.

Atkvøðast kann á http://ekstrabladet.dk/visartikel.iasp?pageID=299197

Les meira um málið á síðu 15.

**-hkm**



*Mynd: Ekstra Bladet*